Leivur Hansen, Ey›un Viderø og Jógvan K. Mørkøre í trongum skóm:

Ver›a kanska stevndir eftir fleiri milliónum í endurgjaldi

– Teir tríggir hava brúkt pening hjá føroyskum kommunum, uttan at hava fingi› loyvi til ta› og ta› standa teir til svars fyri, sigur bygdará›sforma›urin á Strondum.

KOMMUNAL SANERING
Áki Bertholdsen

Leivur Hansen, b‡rá›sforma›ur í Havn, Ey›un Viderø, bygdará›sforma›ur á Sandi og Jógvan K.Mørkøre, forma›ur í Føroya Kommunufelag, eru tríggir mans, sum nú hava fingi› naka› at hugsa um.

Tí teir skulu ikki ver›a bilsnir um teir onkran dagin í næstu framtí› fáa at vita, at teir eru stevndir eftir fleiri milliónum í endurgjaldi.

Teir tríggir eru í st‡rinum fyri Kommunala Ve›haldsgrunnin. Og í farnu viku gjørdu teir av, at betala pening úr grunninum til at sanera tær mest skuldarbundnu kommununar vi›.

Men seinasta or›i› er ikki sagt í hesum máli enn, tí fleiri kommunur eru so misnøgdar um hetta, at tær fara nú at kanna møguleikan fyri at stevna.

Ì hvussu so er ætla bæ›i Hósvíkar og Sjóvar kommuna sær at stevna og ta› skilst, at eisini Nes Kommuna ætlar sær at stevna.

– Vit hava tosa› ley›sliga vi› sakførara. Og hann metir, at er peningur brúktur úr Kommunala Ve›haldsgrunninum at sanera nakrar kommunur vi›, er hetta at ognartaka pening hjá hinum kommununum, sigur Eivind Jacobsen, bygdará›sforma›ur í Sjóvar Kommunu.

– Men sakførarin sigur eisini, at teir einastu, sum kunnu standa til svars fyri hetta, eru teir, sum hava goldi› peningin. Og ta› eru teir tríggir st‡rislimirnir í Kommunala Ve›haldsgrunninum, Leivur Hansen, forma›ur, umframt Ey›un Viderø og Jógvan K. Mørkøre.

– Tí ver›a ta› teir, sum ver›a stevndir, leggur bygdará›sforma›urin á Strondum afturat.

Framtí›in hjá Leivi Hansen, Ey›uni Viderø og Jógvani K. Mørkøre ver›ur spennandi. Gongur ta› illa, noy›ast teir út vi› fleiri milliónum í endurgjaldi úr egnum lumma

Hann sigur, at ta› var ikki av ongum, at Ve›haldsgrunnurin í fyrstu atløgu ikki tordi at betala til saneringina av kommununum, fyrrenn kommununar skrivliga høvdu vátta›, at tær gó›tóku ta›.

– Vit hava ikki loyvi til at krevja skatt inn til anna› enn okkara egnu skattaborgarar. Men nú er peningurin hjá okkum tikin til skattaborgarar í ø›rum kommunum, og ta› er ikki lógligt, uttan at vit samtykkja ta›. Í lógini fyri ve›haldsgrunnin stendur, at peningurin "kann" brúkast til saneringina. Ta› stendur ikki, at hann "skal". Tí mugu vit gera okkara samtykki, sigur Eivind Jacobsen.

Hann sigur, at sakførarin nú skal kanna máli› nærri og so ver›ur endalig avger› tikin. Hann sigur eisini, at ætlanin er at fáa allar kommunurnar, sum eru ímóti saneringini, at stevna í felag.

Jógvan Mørkøre, bygdará›sforma›ur í Hósvík, sigur, at teir fara so langt, sum tilber, fyri at fáa peningin aftur.

Hann sigur, at ta› stendur í lógini fyri Ve›haldsgrunnin, at peningurin er ogn hjá kommununum og tí undrar ta› hann, at tingi› kann taka ræ›i› á pengunum, uttan at spyrja kommununar eftir.

Mugu stevna Løgtinginum

– Ta› kann bara ver›a Løgtingi›, sum kann ver›a stevnt fyri at peningur úr Kommunala Ve›haldsgrunninum er brúktur til at sanera kommunur vi›, sigur Leivur Hansen

KOMMUNAL SANERING
Áki Bertholdsen

– Ta› hevur altí› veri› væntandi, at hetta endar í rættinum. Og ta› er væl eisini einasti máti, at fáa máli› endaliga avgreitt uppá.

Leivur Hansen, forma›urin í st‡rinum fyri Kommunala Ve›haldsgrunnin, sigur, at ta› kemur ikki óvart á seg, um onkrar kommunu fara at stevna, nú peningur úr grunninum er brúktur til at hjálpa teimum mest skuldartyngdu kommununum vi›.

Men hann væntar ikki, at ta› ver›ur hann sjálvur, ella grunnurin, sum kemur at standa vi› endan.

– Tann einasti, sum kann ábyrgjast, ta› er sjálvt Løgtingi›, sum hevur samtykt lógina, sigur Leivur Hansen.

Ta› hevur annars leingi veri› greitt, at ta› hevur veri› ivasamt, hvørjar heimildir grunnurin hevur til at brúka pening til at sanera tær mest skuldarbundnu kommununar vi›.

Hetta hevur bæ›i Gjaldstovan, ein lógfrø›ingur hjá grunninum og grannsko›arin hjá grunninum gjørt vart vi› frmmanundan.

Forma›urin fyri grunnin hevur fyrr sagt, at ein løgfrø›ingur, sum grunnurin spurdi, kom til ta ni›urstøu, at hetta var at ognartaka pening hjá teimum kommunum, sum skuldi gjalda, og at ta› tí kundi roknast vi› endurgjaldskrøvum.

– Tí ba› grunnurin allar kommunurnar um at vátta, at tær gó›tóku, at peningurin úr grunninum var brúktur til hetta endamáli›. Ta› vóru ikki so frægt sum 20 kommunur, i› svara›u grunninum. Og av teimum fóru ta› f‡ra kommunur, sum mótmæltu peningur úr grunninum var› brúktur til at sanera summar kommunur vi›.

Men hóast bara eitt fátal av kommununum svara›u, gjørdi grunnurin hósdagin av at betala teimum mest skuldarbundnu kommununum úr grunninum. Og fríggjamorgunin fekk Gjaldstovan bo› um at flyta peningin.

Hetta var› gjørt eftir ein fund vi› løgmann, har hann vissa›i um, at allar heimildir vóru í lagi og at hetta var ta›, sum løgtingi› vildi, og hev›i samtykt. Og ni›urstø›an hjá løgmanni var tvørturímóti, at ta› var álvarsligt ikki at gera eftir eini løgtingssamtykt.

– Tann løgfrø›iliga metingin hjá løgmanni sigur, at tann einasti, sum kann ábyrgjast fyri tí, sum er hent, er Føroya Løgting, tí st‡ri› fyri grunnin hevur ikki gjørt anna› enn at akta eina løgtingssamtykt, og ta› vera vit noyddir til, sigur Leivur Hansen.

Hann sigur eisini, at bæ›i kommunufeløgini hava á›ur gó›tiki› saneringina og so vítt, hann veit, hevur ongin mótmælt á›ur.

Men Leivur Hansen ásannar, at hetta er lógfrø›iliga ógreitt, tí hetta er pástandur ímóti pástandi. Og einasti máti at fáa ta› avgreitt, er at royna máli› í rættinum.

– Men eru heimildirnar ikki ílagi, er ta› bara Løgtingi›, sum kann ábyrgjast, tí st‡ri› fyri grunnin hevur ikki gjørt anna› enn, ta›, sum Løgtingi› hevur samtykt.



Sandur er ein av teimum kommununum, sum nú ver›a sanera›ar og sum nú fáa luft undir veingirnar aftur

Bilur sendandi gjøgnum urtagar›

FER‹SLUÓHAPP
Ey›un Klakstein

Tórshavn: Leygardagin hendi eitt av teimum meira merkisverdu fer›sluóhappunum í høvu›ssta›num.

Ein bilur, sum kom koyrandi eftir Vegnum Langa, misti av eini hvørjari orsøk taki› á vegnum og fór oman av vegnum, tá hann var komin til Óluvugøtu.

Bilurin fór inn í ein urtagar› ni›an fyri vegin, helt lei›in á fram út úr gar›inum aftur, og enda›i sí›ani á takinum á Gæsugøtu, sum er vegurin ni›an fyri hendan urtagar›in.

Bilførarin kom væl frá óhappinum.

Brutu inn á flakavirki›

LÓGARBROT
Ey›un Klakstein

Um vikuskifti› vóru óbodnir gestir á vitjan á virkinum hjá Fiskavirking á Tvøroyri.

Hesir høvdu broti› seg inn á virki›, og endamáli› vi› innbrotinum var kioskin, sum er á virkinum. Løgreglan á Tvøroyri heldur ikki, at tann ella tey, sum hava veri› á virkinum, hava fingi› naka› burtur úr.

Eitt innbrot var› eisini framt í Havn sunnunáttina, og leygarnáttina var› herverk gjørt móti einum bili, sum stó› vi› Dómhúsi› í C. Pløyensgøtu. Onkur hev›i sligi› ni›ur á taki› á bilinum vi› einum steini, og ein av rútunum var sligin ígjøgnum.

Løgreglan í Havn sigur, at ta› er ein afturvendandi trupulleiki, at fólk gera seg inn á bilar, sum standa júst har.

Tikin tí hann vildi sova

PROMILLAN
Ey›un Klakstein

Tórshavn: Løgreglan í Havn tók um vikuskifti› tveir bilførarar, sum nú ver›a skuldettir fyri at hava koyrt vi› kenning.

Leygarkvøldi› helt løgreglan í Havn seg eisini hava tiki› ein mann, sum koyrdi vi› kenning. Men illgrunin um ov høga promillu kundi ikki sta›festast, og tí kom løgreglan fram til, at ma›urin mangla›i svøvn.

Hesin bilførarin kann vænta sær eina bót, tí ta› er ikki loyvt at sita vi› ratti›, um tú ikki ert førur fyri at koyra.

Hálkan tók fólk á bóli

FER‹SLUÓHAPP
Ey›un Klakstein

Fríggjamorgunin tók fyrsta veruliga hálkan hendan veturin fólk á bóli.

Nógv smærri fer›sluóhapp vóru kring landi›, og í Su›uroy var um reppi›, at ska›i stó›st av, tá ein kvinna fór út av vi› Ósan í Trongisvági. Kvinnan hev›i tvey børn í bilinum, tá óhappi› hendi, men hóast bilurin fekk stóra ska›a, komu kvinnan og børnini óskala› frá hendingini. Onnur smærri óhapp vóru eisini í Su›uroy.

Í Havn fekk løgreglan frábo›an um sjey fer›sluóhapp. Eitt hendi vi› Kaldbakstunnil, tá ein bilur, sum var á veg nor›ur eftir, ikki klára›i at fóta sær, tá hann kom úr bergholinum Kollafjar›armegin. Eingin fekk ska›a í óhappinum.

Seks onnur óhapp vóru í høvu›ssta›num fríggjamorgunin, men einki teirra var álvarsamt.

Tvær kvinnur vóru ov rúsa›ar

Í ØRVITI
Ey›un Klakstein

Tórshavn: Aftur hetta vikuskifti› gistu fleiri fólk á Politistø›ini í Havn. Orsøkin var sum vanligt ov nógv rúsdrekka.

Sunnunáttina var ein ma›ur á stø›ini, tí hann hev›i fingi› ov nógv upp í høvdi›.

Sunnukvøldi› høvdu tvær kvinnur spent bogan ov høgt, og tær enda›u tí á Politistø›ini, har tær sluppu at sova rúsin út mánanáttina.

Byrjanin til vikuskifti› gjørdist eisini í so lívliga ymsasta›ni í Havn, tí løgreglan var› bo›send til ikki færri enn tríggjar húsaófri›ir fríggjakvøldi›.

Leygarnáttina gjørdust tveir mans so ósamdir í Klubbagar›inum, at teir fóru til hendurs. Annar breyt nøsina av einum slagi, og hin ver›ur nú skuldsettur fyri har›skap.

Brø›urnir hittust í Havn

Um vikuskifti› hev›i brø›rasamkoman samfelagsmøti í Havn. Trúbo›arar í Føroyum og útlandinum vóru millum talararnar, og nógvur sangur var á skránni

SAMFELAGSMØTI
Ey›un Klakstein

Hetta vikuskifti› vóru árligu samfelagsmøtini hjá brø›rasamkomuni í Havn.

Møtini byrja›u í Ebenezer mikukvøldi›, og fríggjakvøldi› var fari› í ítróttarhøllina á Hálsi, har møti eisini vóru leygardagin og sunnudagin.

Vánaliga ve›ri› um vikuskifti› fekk helst onkran at setast aftur, men til uppbyggingarmøti› sunnudagin mundu ver›a út ímóti 1500 fólk.

Seinasta møti›, sum var sunnukvøldi› klokkan 19.00, var› sent beinlei›is í Útvarpi Føroya.

Ymsir talarar

Á samfelagsmøtunum hittast fólk í brø›rasamkomuni úr øll landinum, og summi eru vi›, sum vanliga halda til í útlandinum.

Millum teirra vóru hesafer› onkrir trúbo›arar, sum eisini tala›u á møtunum. Ein teirra var Símin í Túni, sum er trúbo›ari í Venezuela, men sum er heima í løtuni.

Millum talararnar vóru eisini heimligir trúbo›arar sum Poul Færø, John í Skemmuni, Pól Johannes Djurhuus, Símun Pætur á Torkilsheyggi og Svenning á Lofti.

Nógvur sangur

Á samfelagsmøtunum er eisini nógvur sangur og tónleikur.

Í Ebenezer eru nógvar gó›ar sangkreftir, og umframt kóri›, sum undir lei›slu av Jens Christiani Guttesen sang eitt sindur lættari sangir enn vanligt á møtunum hesafer›, sungu eisini fólk sum M. C. Restorff, Anna D. Háberg og Ólavur á Váli.

Nógvur felagssangur er eisini á skránni, og seinasti sangurin á møtunum hesafer› var sum vanligt Gud vi› tykkum inntil næstu fer›, sum Victor Danielsen t‡ddi eftir Jeremiah E. Rankin.

Og næstu fer› er á páskum, tá brø›rasamkoman aftur hevur hevur samfelagsmøti. Á hvítusunnu eru eisini samfelagsmøti.

Dúgvan tók sjógv

Fyrrpartin í gjár kom hol á strandfaraskipi› Dúgvuna, tá skipi› bar vi› botn í havnini í Lorvík. Pumpur úr Lorvík og Fulgafir›i máttu flytast umbor› at pumpa sjógv úr skipinum

ÓHAPP
Ey›un Klakstein

Strandfaraskipi› Dúgvan bar vi› botn í havnini í Lorvík fyrrapartin í gjár.

Hol kom á skipi›, og sjógvur streyma›i inn í maskinrúmi›.

Tá Dúgvan hev›i lagt at vi› ferjuleguna í Lorvík, var› skipi› lagt, tí pumpurnar umbor› á skipinum klára›u ikki at halda skipinum lens. Pumpur úr Lorvík og Fuglafir›i vór›u koyrdar umbor› fyri at hjálpa til vi› at pumpa.

Skiparin umbor› á Dúgvuni, Sámal Jákup Hansen, seg›i á middegi í gjár vi› Útvarpi›, at óhappi› hendi, tá Dúgvan var vi› innsiglingina til ferjuleguna í Lorvík. Sí› alda hev›i vi› sær, at Dúgvan tók í botn, og hol kom á.

Øll fer›afólkini komu í land sum vanligt, men farlei›in um Lorvíksfjør› lá still frá klokkan 11.00 í gjár. Tá vit høvdu evstamark her á bla›num var ikki greitt, hvat fór at henda vi› siglingini millum Lorvík og Klaksvík.

Tjaldri var tá á veg til Lorvíkar eftir Dúgvuni, sum skuldi hjálpast til Skála, har ska›in skuldi umvælast.